

# Stjóri til Inni

## Nú stjórin hevur valt at fara frá, sóknast húsameklaravirkið Inni eftir nýggjum stjóra

**Virksemið**
Kjarnuvirksemið hjá Inni er at ráðgeva fólki í sambandi við keyp og sølu av fastognum. Sostatt ert tú við, tá fólk taka eina av teirra mest týðandi langtíðaravgerðum, og fremsta uppgávan er tá at tryggja, at hetta fer fram sambært grundvirðinum hjá Inni, so at allir partar eru tryggir við handilin.

**Uppgávur**
Uppgávurnar eru fjølbroyttar og avbjóðandi. Tú fært ábyrgdina av at stjórna Føroya størsta ognar- og húsameklaravirki. Tú leiðir og samskipar uppgávurnar hjá starvsfólkunum og ert sum stjóri eisini partur av dagliga arbeiðnum á virkinum.

Tú vísir beinleiðis til nevndina fyri P/F Inni.

**Persónligir eginleikar**
- Tú hevur ein jaligan hugburð og góð samstarvsevni
- Tú dugir at leiða og geva starvsfólkunum íblástur
- Tú ert uppsøkjandi og ikki bangin fyri at taka avgerðir
- Tú hevur ans fyri tølum og handilsligan hugburð

**Fakligir førleikar**
Meklaraútbúgving og leiðsluroyndir eru ein fyrimunur, men ikki eitt krav. Vit vænta tó, at tú hevur handilsliga útbúgving og royndir frá líknandi starvi.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hannelenu Mittún, stjóra, á tlf. 354200, hannelena.mittun@inni.fo ella til Øssur Skeel Nolsøe, nevndarlim, á tlf. 348300, ossur.nolsoe@eik.fo. Fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði. Starvið verður sett skjótast gjørligt og verður lønt eftir avtalu. Skrivligar umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. mars og skulu stílast til:

**P/F Inni**
Att:: Nevndin
Postboks 364
110 Tórshavn

ella í teldupostí til ossur.nolsoe@eik.fo

Grundvirðið hjá Inni er álit millum seljara, keypara og okkum sum meklarar, so allir partar eru tryggir við handilin, fáa eina góða tænastu og kenna seg væl - eisini eftir, at alt er undirskrivað. 6 fólk arbeiða í P/F Inni, og vit hava skrivstovu í Havn, Klaksvík og á Saltangará. Inni er partur av Eik samtakinum.

– trygt og ómaksleyst til hús

PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
110 Tórshavn

Telefon +298 354200
inni@inni.fo

inni.fo